# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Til minnis um mína kæru ommu Kirstin

27. apríl fer altíð at verða ritaður mær í minni – tá misti eg tað dýrabarasta eg átti. Mín elskaða omma Kirstin Ingibjørg Baldwin andaðist bert 70 ára gomul. Aldri hevði eg trúð, at tú skuldi fara frá okkum. Fólk doyggja, tað veit eg, men at tú eisini ein dag skuldi fara var óveruligt! Altíð hevur tú givið so nógva gleði frá tær, og lív var eisini altíð har tú vart. Bara tað at tosa um teg í tátíð, kennist so skeivt. Omma góða, mær leingist illa eftir tær. At vita at eg aldri aftur fari at hoyra tína mildu rødd, ella títt stuttliga lyndi aftur, pínur meg. Alt tað vit hava havt saman, allar tær samrøður vit hava havt, øll tey góðu minni tú hevur givið mær, liggja tætt at mínum hjarta. Eg takki tær fyri alt, og eg fari aldri at gloyma teg!

Nú farin ert tú, hvat geri eg nú?

Hettar er ringt at skilja, og pínan er ikki til at dylja.

Plássið eftir tær stendur tómt, fólk, ið ei teg kendu, hava seg forsømt.

Køn vart tú blivin í teldu, noy, ikki vart tú sum øll onnur eldru.

Manga útferð vit báðar hava havt saman, og tær hava verið til bæði gleði og gaman.

Altíð var futtur í, tá ið omma kom uppí.

Á 70 ára degi vit paintball fóru at spæla, noy, tú vildi ikki bara ganga heima og mala.

Tú vart altíð í sving, og um teg, ber ikki til at siga keðilig ting.

Títt lív hevur ikki altíð verið nemt, men tú dugdi at taka skemt.

At vera seingjarliggjandi var ikki júst tú, noy, tú vildi heim, og tað skuldi vera nú.

Alt ov tíðliga tú frá okkum fór, ja, tað kunnu vit øll siga í kór.

Forhold okkara hevur altíð verið tætt, so nú kanst tú ætla, at eg ikki havi tað lætt.

Eftir vit tóm standa, ei vistu vit tú vart í vanda.

Eg dugi ei at fata, hví tú ikki deyðanum kundi bata!

Omma góða, eg takki fyri øll tey minnir vit hava havt saman. Hvíl í friði góða, eg elski teg!

**Ingibjørg**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Aksel Jacobsen**, Fuglafirði, andaðist leygardagin á Eysturoyar røktar- og ellisheimi, 81 ára gamal. Kistan fer av røktarheiminum í Runavík mikudagin klokkan 18.00. Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar kirkju hósdagin kl. 14.00. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Aksel, kunnu lata Røktar- og ellisheiminum í Runavík eina peningagávu, konta í peningastovnunum.

**John Fung**, maður Eyðinfríð Ziska Fung, andaðist í Sacramento fríggjadagin.

**Joen Jacob Gaard Joensen**, vanliga nevndur Jack, ættaður úr Skopun, andaðist sunnudagin á Ríkissjúkrahúsinum, 64 ára gamal. Bønarhald verður í Jacobs Kirke, Østerbrogade 59, mikudagin klokkan 11.30, danska tíð. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Margreta Haraldsdóttir Jensen** av Sandi andaðist sunnumorgunin, 25 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.



## Elsa og Birgit í Smiðjuni

FRAMSÝNING

Komandi fríggjadag klokkan 14 letur upp listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík við Susanne Hansen úr Esbjerg og Elsu Zachariasen og Birgit Kirke úr Havn.

Tær sýna fram málningar og skulpturar. Tað at Elsa og Birgit eru ættaðar úr Føroyum sæst aftur í málningunum. Málningarnir eru bæði naturalistiskir og abstraktir, og hava serstakan íblástur úr føroysku náttúruni, har ljósið og landslagið er sermerkt.

Skulpturarnir er lívsmyndir gjørdir úr endurnýtslutilfari.

Framsýningin er opin til og við týsdagin 11. august. Allar dagar er opið frá klokkan 14 til klokkan 18.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu, tá kæri pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Niels Pauli Djurholm,**
**Kollafjørður**

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri kransar, blómur og heilsanir. Takk til sangarar og annars øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina. Takk til bygdarhúsið í Kollafirði og til øll, sum hjálptu til við ervinum. Takk til Eldrasambýlið í Kollafirði og Tjarnargarð fyri hjartaliga umsorgan. Takk til Berg D. Joensen, prest, fyri troystarrík orð í kapellinum og kirkjuni.

Tøkk til øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Ingrid, Arnóra, Hans og Bjarni**



## Prógv

24. juni tók Búgvi Poulsen prógv sum byggifrøðingur á VIA University College í Horsens.

†

**Joen Jacob Gaard Joensen,**
**vanliga nevndur Jack,**
ættaður úr Skopun
búsitandi í Keypmannahavn

andaðist á Ríkissjúkrahúsinum 2. august, 64 ára gamal.

Bønarhald verður í Jacobs Kirke, Østerbrogade 59, mikudagin 5. august kl. 11.30 danska tíð. Jarðarferðin verður lýst seinni.

*Vegna tey avvarðandi*
**Systkini**

## Dagurin

**4. august. Dominicus**, deyður í 1221. Hann var úr Spaniu, og er fram um alt kendur sum maðurin, ið stovnaði eina munkaskipan, ið fekk navn hansara og skjótt kom víða um lond. Navnið dominicanes kann eisini verða týtt Harrans hundar, sum fólk róptu teir.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*